# *BÝRÁÐSFUNDUR*

**Dagfesting:** 29.02.2016 kl. 19:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Anna Brattaberg Samuelsen
Dánjal Bjarkhamar
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen
Tórður Poulsen
Eyðbritt Krosslá

Ikki møtt: Conrad Gaard Joensen, fráboðað

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 12/16 | 16/00015-2 | Matr 549c omanfyri Rock | 2 |
| 13/16 | 16/00042-2 | Grunnurin Páls Høll søkir um stuðul fyri 2016 | 2 |
| 14/16 | 16/00021-2 | Vinarbýarvitjan í Íslandi vár/summar 2016 | 3 |
| 15/16 | 16/00061-3 | Eftirskúlin í Suðuroynni | 4 |
| **Til kunningar/umrøðu** | | | |
| | | | |

## 12/16 Matr 549c omanfyri Rock

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2016 | 21/16 | 16/00015-2 |
| 2 Vágs Býráð | 29.02.2016 | 12/16 | 16/00015-2 |

Mælt verður til, at keypa øki frá Hamrahaga fyri 69 kr/m2, og at teir fáa 4,80 kr/m2 fyri vetrarbiti. Sí viðfesta skeytið.
Hetta er sami prísur, ið var brúktur tá grannaognin var keypt frá Sólju V / Annu Kristinu A.

Hetta er liður í, at víðka kirkjugarðsøki inni í Líðini.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, og beina málið í býráðið.

**Vágs Býráð 29. februar 2016:**
Einmælt samtykt.

## 13/16 Grunnurin Páls Høll søkir um stuðul fyri 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 15.02.2016 | 21/16 | 16/00042-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2016 | 18/16 | 16/00042-2 |
| 3 Vágs Býráð | 29.02.2016 | 13/16 | 16/00042-2 |

Grunnurin Páls høll søkir um stuðul á kr. 300.000,- fyri árið 2016.

**Mentanarnevndin 15. februar 2016:**
Nevndin mælir til at stuðla og beinir málið í FN.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2016:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt at viðmæla at játta hetta, málið verður beint í býráðið.

**Vágs Býráð 29. februar 2016:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

# 14/16 Vinarbýarvitjan í Íslandi vár/summar 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.01.2016 | 16/16 | 16/00021-2 |
| 2 Vágs Býráð | 25.01.2016 | 9/16 | 16/00021-2 |
| 3 Vágs Býráð | 29.02.2016 | 14/16 | 16/00021-2 |

Tá býráðið úr Sangerði var á vitjan í Vági juni 2015, bjóðaðu tey Vágs býráð at koma á vitjan í 2016.

**23. Februar 2016:**
Borgarstjórin ynskir at taka hetta mál til umrøðu av nýggjum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2016:**
Samtykt at gera av á komandi býráðsfundi nær farið verður til Sangerði. Og hvør umboðar Vágs kommunu.

**Vágs Býráð 25. januar 2016:**
Semja um at allir býráðslimir saman við makum umboðar Vágs kommunu. Skotið verður upp at fara vitja í Juni.

**Vágs Býráð 29. februar 2016:**
Borgarstjórin vísir á, at sera nógv er á skránni í summar í Vági, og tí er ikki so heppið at verða burtur hetta tíðarskeiðið. Skotið verður upp at útseta hesa vitjan til seinni uppá árið.
Einmælt samtykt.

## 15/16 Eftirskúlin í Suðuroynni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 29.02.2016 | 15/16 | 16/00061-3 |

Málið og tankarnir viðv. at byggja ein Eftirskúla í Føroyum hava verði frammi leingi. Ítøkiliga var ætlanin at Eftirskúlin skuldi byggjast í Hvalba og tók Vágs kommuna eisini undir við hesum.
Við uppritið frá Mentamálaráðnum dagfest 13. mai 2009, vóru stigtakarar og borgarstjórarnir í Suðuroynni kallaðir á fundi 19. mai 2009 kl. 18.00 í Miðnámsskúlanum í Hovi. Endamálið við fundinum var m.a. at lýsa málið so gjølla sum gjørligt, staðfesa fíggjarliga leiklutin hjá kommununum, soleiðis at landsstýrið kennir allar fortreytir at taka endaliga støðu út frá, og at royna at finna semju um eina loysn, sum bæði landið og kommunurnar kunnu arbeiða víðari við.

Borgarstjórarnir hava síðani sent landsstýriskvinnuni í Mentamálum (Helenu Dam á Neystabø) skriv dagfest 2. juni 2009 hvar víst verður á at teir halda framvegis, at rættast er at byggja nýggjan eftirskúla, men staðfesta at landstýrisvinnan ikki tekur undir við hesi loysn. Teir eru samdur um, at allar kommunurnar í Suðuroynni nú kanna møguleikan fyri eftirskúlavirksemi í verandi bygningum í oynni.

Hetta hevur Vágs býráð viðgjørt á fundi 26. august 2009 og var niðurstøðan hjá býráðnum soljóðandi: Býráðið samtykti einmælt at vísa á, at Vágs kommuna metur seg ikki hava nakran hóskandi bygning at vísa á. Mett verður rættast, at ein slíkur eftirskúli hevur eitt umhvørvi. Vitandi um, at Sumbiar kommuna hevur bjóða fram teirra skúla, metur Vágs kommuna hetta sum eitt brúkiligt alternativ.

Á býráðsfundin 30. mars 2015 umrøddi Vágs Býráð á býráðsfundin tíðindini í fjølmiðlunum um ætlaðu byggingina av eftirskúla í Drelnesi, men hetta hevur ongantíð verður partur í málsviðgerðini av eftirskúla í Suðuroy. Og tí ongantíð viðgjørt í Vágs Býráð.

**Vágs Býráð 29. februar 2016:**
Sitandi Býráð tekur framvegis undir við niðurstøðuni hjá undanfarna býráð frá 2009.

Vágs býráð hevur alla tíðina tikið undir við at byggja nýggjan eftirskúla í Hvalba. Um tað ikki verður bygdur nýggjur eftirskúli, so skuldi kommunurnar fáa høvið at bjóða verandi bygningar fram.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 19:30</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Conrad Gaard Joensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |